


## Evertonhópurin fullmannaður

Everton spæla í kvøld í UEFA Cup kappingini móti Brann úr Noregi. Fyrsti dysturin millum liðini endaði við 2-0 sigri til onglendingarnar. Mikel Arteta, Thomas Gravesen og Steven Pienaar eru allir klárir aftir, eftir smásnuddir. Hvørgin teirra var við í fyrsta dystinum, tá Everton vann í Bergen. Venjarin, David Moyes gleðist sum vera man yvir at hópurin er frískur og klárur til dyst. – Hetta er bert aðru ferð í ár, at eg havi havt fullan hóp at velja út frá, so tað er sjálvandi at gleðast yvir, sigur fryntligi skotski venjarin David Moyes. Everton eru í einari sera góðari støðu til at koma víðari í kappingini, men Moyes sigur seg vera varnan við at siga nakað, áðrenn dysturin er liðugur í kvøld. – Vit hava gamaní góðar vónir, men vit vita eisini alt ov væl, hvussu skjótt tað kann venda í fótbólti, sigur David Moyes at enda

# Víkingur kann missa venjaran

**Sum skilst eru eru trupulleikar við at vátta neyðuga venjaralisensin, og tí kann brasilski venjarin noyðast at takka fyri seg í komandi viku**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fríggjadagin skulu føroysku fótbóltsfeløgini lata FSF váttan um, at øll ásett krøv til feløgini eru lokin.

Millum hesi pappír skal váttan um UEFA A-lisens hjá Formula-venjarum eisini vera, men spurningurin er, um GÍ megnar at koma við rætta pappírinum.

Tað ljóðar úr Gøtu, at hóast brasilski Dida hevur virkað sum venjari í Europa og eitt nú eisini hevur verið vietnamesiskur landsliðsvenjari, so gongst illa at fáa rætta stemplið á pappírini.

Enn er tó meira enn eitt samdøgur, til pappírini skulu latast inn, og tá fæst at vita, um venjarin kann halda fram. Men sum skilst, so hevur venjarin boðað spælarum sínum frá, at tað er væl hugsandi, at hann ikki fær hildið fram.

Um so er, so er spurningurin, um Víkingur framvegis verður einasta Formula-felagið við útlendskum venjara, ella um felagið finnur sær eina føroyska loysn.

Leiðslan í Víkingi ynskir ikki at gera viðmerkingar til tíðindini.




*Brasilski Dida hevur glett seg til uppgávuna í køldu Føroyum. Men nú er vandi fyri, at uppgávan verður av ongum*

# Giggs rundaði 100 dystir í Champions League

**Ryan Giggs hevur nú leikt 746 almennar dystir fyri Manchester United, og manglar bara 14 dystir í at taka metið frá Bobby Charlton**

*Heri Simonsen*
*hersim@sosialurin.fo*

Fótbóltsáhugað í Føroyum, sum eru komin upp um tey 20 árini minnast væl ein landsdyst á Svangaskarði fyri 15 árum síðani. Føroyar leiktu ímóti Wales, og millum Premier League stjørnurnar hjá Wales vóru Neville Southall, Dean Saunders, Mark Hughes, Ian Rush, og hin tá bert 19 ára gamli Ryan Giggs. Svangaskarður var stúgvandi fullur, tí mong vildu nýta høvið at síggja bæði tær eldru og yngru stjørnurnar hjá Wales. Nógv vatn er runnið í Saltá síðani hendan dagin á Toftum, men Ryan Giggs leikar enn fótbólt á hægsta støði. Ígjár leikti hann sín dyst nr. 100 í Champions League fyri Manchester United. Samstundis var hetta dystur nr. 746 hjá honum fyri Manchester United í heimligum og altjóða kappingum. Í




*Ryan Giggs hevur verið góður fongur hjá Sir Alex Ferguson í Manchester United. Í gjárkvøldið rundaði hann dyst nummar 100 í Champions League*

hesum 746 dystunum hevur hann skorað 143 mál fyri United. 14 dystir aftrat, og hann hevur tikið metið frá legendini, Bobby Charlton.

### Eigur metið

Ryan Giggs er samstundis tann leikarin í søguni, sum hevur vunnið flest enskmeistaraheitið. Hann hevur verið enskur meistari í 1993, 1994, 1996, 1997, 1999, 2000, 2001, 2003 og í 2007. Hann hevur vunnið steypakappingina í 1994, 1996, 1999 og í 2004. Hann hevur vunnið Liga steypakappingina í 1992 og í 2006. Saman við Manchester United hevur hann eisini vunnið Champions League í 1999. Hetta var tað minniliga árið tá United vunnu “The Treble”.

### Føddur Wilson

Ryan Giggs er føddur í Cardiff, Wales hin 29. november í 1973. Upprunaliga æt hann Ryan Joseph Wilson. Mamman eitur Lynne Giggs, og pápin eitur Danny Wilson. Mamman er walisisk, meðan pápin er onglendingur, sum er av hollendskari og sierra leoniskari ætt. Giggs er stoltur av sínum fjølbroytta uppruna, men valdi eftirnavnið hjá mammuni, og valdi at leika við Wales. Pápin, sum var ein rættuliga harðligur maður hevði ikki góða ávirkan á familjulívið, og tískil valdi Giggs at fylgja mammuni, bæði privat og tjóðskaparliga. Giggs leikti 64 landsdystir fyri Wales, og skeyt 13 mál í hesum dystunum. Tá Giggs leikti sin fyrsta landsdyst, var hann bara 17 ára gamal, sum er walisiskt met. Pápin var ein rættuliga góður Rugby League leikari, og hevur Giggs sagt, at hann hevur arva ferðina og balansuevnini frá pápanum. So hann virðir pápan, sum ítróttarmann, um ikki sum privatpersón.

### Friðarligt privatlív

Tá Ryan Giggs var yngri bleiv hann ofta samanborin við norðuríran, George Best (1946-2005), sum var stóra stjørnan hjá Manchester United seinast í 1960-unum og fyrst í 1970-unum. George Best bleiv spurdur um Ryan Giggs “var tann nýggi George Best”. Sjálvspeiðin, men samstundis við fullari virðing svaraði George Best: “Nei! Eg haldi heldur, at eg var tann fyrsti Ryan Giggs”. Giggs minnir nógv um Best, sum leikara, men tíbetur hevur privatlívið ikki mint nakað, um privatlívið hjá Best, sum doyði, sum alkoholvrak longu 59 ára gamal. Tí gjørdi Alex Ferguson nógv við at verja Ryan Giggs tá hann var ungur, so hann ikki kom í sama óføri, sum George Best. Og sigast má, at tað hevur verið gott og gagnligt fyri Giggs, at Ferguson valdi hendan leistin. Ein fyrrverandi unnusta pástóð einaferð yvirfyri ensku pressuni, at Giggs hevði sligið hana. Men tað bleiv ikki nógv súpan kókað burturúr tí bótini. Giggs, sum hevur havt útsjóndina við sær hevur gjørt lýsingar fyri m.a. Reebok, Citizen, Celcom og Fuji. Áðr-

## Atgongurmerki á netinum

FÓTBÓLTUR
*Tíðindaskriv*

Hon riggaði ikki til Fraklands-dystin, men nú er FSF til reiðar at selja atgongumerki á netinum

Í samstarvi við veitaran, er atgongumerkjaskipanin nú avroynd av nýggjum og sett í gongd, og hon verður nú roynd í sambandi við Stórsteypadystin millum NSÍ og EB/Streym, sum verður spældur á Ovara Vølli í Gundadali, leygardagin 8. mars kl. 15.00.

Talan er um dystin millum føroyameistararnar og steypavinnararnar frá 2007. Stórsteypadysturin er ein vælgerðardyst har ágóðin av dystinum fer til vælgerðandi arbeiðið hjá Lions Club.

Tað ber nú til at keypa atgongumerki til dystin gjøgnum heimasíðuna hjá Fótbóltssambandinum, www.football.fo. Í hesi skipanini verður goldið við vanligum gjaldskorti, og atgongumerkini verða síðan send við postverkinum.

Eftirsum hetta er fyrstu ferð at skipanin verður roynd, verður eisini skipað fyri lutakasti millum tey, ið keypa atgongumerki gjøgnum internetið. Útlutaðir verða tveir pakkar við atgongumerkjum til allar heimadystirnar hjá A-landsliðnum í sambandi við HM-undankappingina í ár og næsta ár. Drigið verður í hálvleikinum.

Kostnaðurin fyri hvørt atgongumerki á netinum er 60 krónur. Harafturat verður tikið eitt avgreiðslugjald á 10 krónur. Avgreiðslugjaldið er tað sama uttan mun til hvussu nógv atgongumerki verða keypt.

Við dyrnar kosta atgongumerkini 70 krónur, men hesi vera ikki við í lutakastinum.